## Tinghellan

» -Tað er einki dulsmál, at gerast Føroyar limur av EFTA, fer EFTA at standa munandi sterkari á fiskivinnuøkinum. Tú mást minnast, at Noreg, Ísland og Føroyar umsita hvør sær nógv størsta partin av fiskivinnuni í Norðuratlantshavi. Velja tey trý londini at ganga saman í EFTA, verður støðan munandi sterkari mótvegis ES«

*Knut Almestad, fyrrverandi norski sendimaðurin hjá Noregi í EFTA, Sosialurin 11.08.05*



»Tað eru tríggir møguleikar: tú kanst gerast limur í ES sum er, tú kanst gerast limur sum sjálvstøðugt land, ella tú kanst gerast limur í EFTA, og eg trúgvi, at EFTA er tann møguleikin, sum politiskt hevur best møguleika.

*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, Sosialurin 18.05.05*



# EFTA - lovaða landið

## Tinghella



**Páll Holm Johannesen**
pall@sosialurin.fo

**Okkara fiskivinna fær frið. Søgulig møguleiki at fremja okkurt á uttanríkisøkinum. Betri atgongd til ivasamar fríhandilsavtalur. Eitt styrkt fiskivinnusamstarv. Hetta eru nakrar av orsøkunum til, at løgmaður er so bráður at innlima Føroyar í EFTA**




Á vári í 2005 snikti eitt nýtt gandaorð seg upp í føroyskan uttanríkispolitikk. Úr Tinganesi hevur í fleiri ár verið júkað um, at Føroyar mugu fyri alt í verðini gerast virknari á altjóða politiska leikpallinum. Og loysnina upp á tann trupulleikan hevur ABC-samgongan funnið í lyklaorðinum við teimum fýra stavunum E-F-T-A.

Løgmaður hevur bæði undir ólavsøku- og nýggjársrøðum gjørt Føroya fólki greitt, at landsstýrið strembar eftir føroyskum limaskapi í altjóða handilsfelagsskapinum EFTA. Og nógv hevur verið lagt fyri.

Bæði løgmaður og embætisfólkið í Tinganesi hava verið á fleiri sjarmuferðum – bæði á høvuðstøðini hjá EFTA og ikki minst hjá teimum fýra limalondunum. Kortini tykist dreymurin um limaskap framvegis fjarður.

Gamaní, mótburðurin síðan startskotið í 2005 hevur verið stórur.

Anders Fogh Rasmussen var skjótur at seta føtur í spenni, tá hann varskógvaði, at ein føroysk umsókn um limaskap í EFTA ikki kemur upp á tal, áðrenn Føroyar hava yvirtikið øll 12 málsøkini, sum eru knýtt at fullum limaskapi.

Eitt høvuðsendamál við at gerast partur av EFTA samstarvinum var at nýta limaskapin sum jarnbrot til at gerast partur av attraktivu EBS-avtaluni, sum hevur verið ein av grundsúlunum í búskaparligu menningini í bæði Noregi og Íslandi. Men hendan ætlan varð skjótt kolldømd, tí okkara ríkisrættarliga støða forðar tí.

Bæði politikarar og serfrøðingar – føroyskir og útlendskir – hava eisini koyrt tummilfingurin niður fyri ætlanini hjá landsstýrinum. Onkur hevur skýrt EFTA-limaskapin virðisleysan uttan eina EBS avtalu. Annar heldur, at fækkandi limalondini í EFTA er eitt sólarklárt tekin um, at felagsskapurin er ein søkkandi skúta. Ein triði væntar, at tað bert er ein spurningur um tíð, áðrenn Noreg og Ísland taka stig til at gerast partur av ES, og tá verður EFTA ikki lív lagað.

Tey fýra limalondini Ísland, Sveis, Liktenstein og Noreg hava heldur ikki beinleiðis tikið móti Føroyum við víðopnum ørmum. Ísland ynskir Føroyar sum lim, meðan greipan Sveis og Liktinstein hevur sýnt Føroyum lítlan áhuga. Hinvegin hevur verið torført at fáa eina greiða útmelding um støðuna hjá Noregi.

Men hví er løgmaður so altráður eftir einum limaskapi í EFTA, tá so nógvir sjónligir snávingarsteinar eru at hóma?

### Óttin fyri Brússel

Rákið úti í heimi seinastu árini er týðuligt. Fleiri og fleiri lond ganga saman í størri felagsskapir og lata stórar partar av sínum nationala sjálvsavgerðarrætti á týðandi økjum til hesar felagskapir. Í Evropa leggjast fleiri og fleiri lond afturat ES. Ferskasta dømið er Bulgaria og Rumenia, ið gjørdust limir um ársskiftið.

Í fleiri áratíggju hava ymisk landsstýri roynt at tryggja Føroyum eitt tættari tilknýti til Evropa – og serliga tann evropeiska marknaðin. Hetta hevur kortini verið lættari sagt enn gjørt. Hugburðinum hjá bæði politikarum og vanliga føroyingum til ES er ikki stórvegis broyttur, síðan løgtingið fyri yvir 30 árum síðan valdi at standa uttanfyri ES.

Serliga óttin fyri felags rikna fiskivinnupolitikkinum úr Brússel hevur verið ein áhaldandi grundgeving fyri ikki at trína inn í ES. Javnan verður víst á, at kvotaskipanin hjá ES hevur havt við sær, at fiskivinnan í londum sum Spania, Portugal, Onglandi og Danmark hevur verið vanrøkt, síðan londini gjørdist limir í ES.

Meðan óttin fyri ES er stórur, stendur betri til við Geneve, har høvuðsdeildin hjá EFTA heldur til. Hetta kemst ikki minst av, at EFTA er grundleggjandi øðrvísi skipað enn ES. Meðan limalondini í ES lata fleiri og fleiri heimildir til ES, er EFTA ein felagsskapur, har limalondini framvegis hava ræðisrættin á flest øllum viðurskiftum.

At vit framhaldandi sleppa at skipa okkara egna fiskivinnupolitikk, hóast vit gerast limir í EFTA, vigar uttan iva nógv hjá landsstýrinum. Undir orðaskiftinum um EFTA á vári í fjør kom eisini greitt fram, at løgtingslimir fegnaðust um, at fiskivinnupolitikkurin ikki verður rørdur við føroyskum EFTA-limaskapi.

Men. Heldur enn at halda krampakent upp á okkara fiskirættindi, mugu vit hyggja longri og tora at seta spurningin um gullkálvurin – okkara fiskiríkidømi- ikki skal offrast fyri at fáa tættari samband við ES. Tí tað er tættari samstarvi við tann felagsskapin, sum kann tryggja Føroyum veruligan framburð.

Eg sigi harvið ikki, at vit skulu avreiða okkara fiskivinnu til ES fyri ein og hvønn prís, men vit

Sosialurin